

# a av írskum




Oftani verða okkara kendu listafólk ikki viðurkend sínar veruligu dygdir. So leingi onkur er eitt 'up-coming' og ókent navn, verður viðkomandi einstaklingur ella bólkur róstur til skýggja, og allar dygdirnar verða penslaðar út.

Men tað tykist sum, at tá somu einstaklingar ella bólkar gerast lutfalsliga kendir, verður fokus flutt frá góðu eginleikunum, sum frammanundan vóru so áhugaverdir, til tey tingini, sum halta.

Tað er eitt sindur soleiðis við Eivör. Tað hendir meiri enn so, at onkur hevur eitt ella annað, sum viðkomandi metir songkvinnuna kunna gera betur.

At væntanin og krøvini gerast størri sum listafólkið mennist og ger um seg, sigur seg sjálvt. Men tað er ein ófrávikilig sannroynd, at Eivör syngur heilt einastandandi væl. Og um onkur vildi verið við, at hon er besta songkvinna føroyingar nakrantíð Neyvan er tað nøkur onnur songkvinna í Føroyum, ið fevnir um eins nógvar oktavar og hon.

Samstundis eru tað ár síðani (um tað nakrantíð hevur verið!), at Eivör og 'at syngja falskt', hevur verið nevnt í sama setningi. Hon hevur sítt egna ljóð og egnan máta at syngja uppá. Hon komponerar, yrkir, spælir (væl) kassagittar, syngur opera o.s.fr. Eitt heilstoypt image. Og so er hon bert 23 ár.

## Fjølbroyttir hattar

Á nýggju fløguni *Mannabarn* síggja vit Eivör í einum nýggjum og annarleiðis leikluti. Á undanfarnum útgávum hevur oftani verið talan um eitt sindur øðrvísi ljóð og stíl, um ein hugsar í 'mainstream' banar.

Millum tónlistarligu hattarnar, ið unga fjøllistafólkið hevur havt á gjøgnum lívið, kunnu nevnast: jazzdiva (Yggdrasil/Ivory), gátufør rokknorna (Clickhaze), operastjørna (í operuni Arnhild og Eystein) og í seinastuni; ráður countryfjakkari við Bill Bourne.

Nú kann Eivör leggja ein hatt aftrat í fjølbroytta savnið: poppsangari við einum tvisti.

## Tamd

Og gøtugentan riggar væl í reina og nossliga leiklutinum.

Tað er sum um, at Eivör er tamd eitt sindur. Oftani hevur talan verið um fløkjasligar krúllur og endaleysar improvisatiónir, sum eisini hava verið hóskandi í sínum høpi.

Men á hesi fløguni er produktiónin so poppkend og pen, at tílíkar krúllur og improvisatiónir als ikki høvdu riggað inn.

Eivör er Eivör, og ein skal ikki lurta longri enn í tíggju sekund, áðrenn tað gerst greitt. Hon hevur aldrin verið tann, ið passaði inn í ein penan tónlistarligan kassa. Og í støðum hoyrist tann ótamda Eivör aftur, men tá ljóðar tað natúrligt og riggar væl. Einki overkill, men eitt smakkligt íkast.

## Snøgt og rátt

Húsin avspeglar sera væl tónleikin á fløguni. Hann er ótrúliga snøggur og penur, men samstundis fyltur við ymsum ráum elementum.

Longu á permumyndini síggja vit hetta samspælið. Har sæst ein sera pen og flott Eivör, men vovin inn í ein tornarunn.

Eisini inni í bóklinginum er alt sett upp á ein vakran hátt, men við einum hárlokki, eini brotnari dukku og einum fuglavongi verður tað ráa og ótamda eisini umboðað.

Vakrar myndir tiknar av Kristfríð Tyril, og somuleiðis hevur føroyska fyritøkan, nörd, gjørt eitt flott arbeiði við húsanum.

## Føroyska Céline Dion

Nú traðki eg allarhelst onkran fjeppara á tærnar, men meðan eg lurtaði eftir lagnum Tú ert alt hugsaði eg: »Hatta er júst ein sangur, ið Céline Dion hevði kunnað sungið«.

Talan er um eina sera pena balladu, ið Eivör syngur inniliga og væl. Orðini eru sera einføld, men saman við stilla lagnum riggar:

*Tú ert alt,*
*tú ert sólin.*
*Tú ert alt,*
*tú ert myrkrið.*
*Tú ert alt,*
*tú ert gleðin,*
*alt tað, sum lýsir*
*og alt tað, sum slóknar*

Hvønn sungið verður um, kemur ikki greitt fram. Men hetta er neyvan av tilvild. Talan kann vera um ein unnusta/eina unnustu, um Føroyar, um Gud ella okkurt heilt annað. Allarhelst er hetta eitt tilvitað val frá Eivörsa síðu, soleiðis at lurtarin sjálvur kann hava ein móttakara í huga.

## Málið

Hóast Eivör nýtir eitt sera einfalt mál, er talan um góðar tekstir, sum hava eitt natúrligt flow. Ein situr ikki og fýlist á, at ov nógv orð verða kroyst inn í eina takt, sum ein so oftani hevur gjørt fyrr.

Reglur verða ofta endurtiknar. Eitt brot úr Livandi trø:

*Innast inni eru vit*
*eitt brúsandi hav.*
*Innast inni eru vit*
*eitt brúsandi hav.*
*Ýlandi vindar á myrkari nátt,*
*eitt brúsandi hav*

Neyvan er hetta tí, at Eivör hevur manglað íblástur, men heldur eitt tilvitað val, sum eftir mínari meting riggar væl.

## Ástarkend

Í sanginum *Dansins harri* vísir Eivör eina síðu av sær sjálvari, sum ikki oftani kemur fram:

*Tak mína hond,*
*og skipa tú dansin.*
*Halt mær fast*
*Og ver ei ansin,*
*tí júst henda stund*
*er okkara eina.*
*So valsa meg inn*
*í kærleikan reina.*

*Leið meg avstað,*
*dansins harri,*
*halt mær fast.*
*Lat orð vera færri,*
*tí okkara varrar skulu ei tala.*
*Lat okkum bert dansa,*
*lat tónleikin spæla*

Her sær man eina meiri ástarkenda Eivör, sum eftir mínum tykki riggar væl. Tónleikurin gongur í einum valsi og tú sært næstan fyri tær, hvussu unga sprundið dansar við sínum útvalda í eini stórari veistluhøll.

## Írblástur

Sum mong longu vita, so er fløgan tikin upp í Írlandi, og hetta hoyrist aftur. Írskar sekkjapípur, floytur og strúkarir gera sítt til, at tankarnir til tíðir verða leiddir til írska bólkin The Corrs.

Írski íblásturin er heldur ikki nakað, sum Eivör vil fjala. Í samrøðu við Sosialin herfyri, segði hon, at hon hesuferð hevði 'grava seg í írska tónleikin'.

Serstaka røddin hjá Eivör og írsku ljóðførini eru ein væleydnað tvinning.

## Mátti sodna

Tá ið eg fyri fyrstu ferð setti fløguna í og spentur trýsti á play, má eg viðganga, at eg gjørdist eitt sindur skuffaður av fyrsta lagnum *Mannabarn*. Lagið var eitt sindur monotont og koyrdi nógv í tí sama.

Eg haldi framvegis, at lagið er eitt sindur einsljóðandi og avgjørt tað skeiva at velja til fyrstu skering, men eftir at hava lurtað fløguna ígjøgnum nakrar ferðir, dámar mær nógv betri lagið.

Eisini eru orðini hjá Martin Joensen sera vøkur og væl skrivaði:

*Hægsta træ*
*Klúgv uppí.*
*Kelduvað*
*far útí*
*- Røkkur tú?*
*- Søkkur tú,*
*mannabarn*

*Legg so kós,*
*lat ei blinda teg snarljós,*
*brakandi tora*
*ikki forða*
*tær skal*

*Mannabarn, halt á,*
*mannabarn*

Tað sama er galdandi við restina av fløguni. Í mínum føri mátti hon koyra nakrar ferðir ígjøgnum áðrenn hon ordiliga slapp innum.

Bæði áðurnevndu løgini *Tú ert alt* og *Dansins harri* eru serliga vøkur, eftir mínum tykki. Eisini *Mother Theresa* og *Lurta* koyra væl. Einasta lagið, ið ikki heilt tekur við er *Livandi trø*. Lagið hevur eitt sindur av eysturlendskum ísletti, sum ikki heilt slær til, og tjantið hjá Eivör ljóðar ikki væl. Og so fyri at tosa tónleikatos; bassljóðið hevur ein flatan 90'ara klang, sum ikki gera tað frægari.

## Til síðst

Men talan er avgjørt um eina vælproduseraða, vælspælda og vælsungna framleiðslu. Hetta er heilt avgjørt tað besta Eivör hevur gjørt, og eg njóti at lurta eftir henni.

Einans framtíðin kann vita, hvar hendan útgávan førir okkara kendastu songkvinnu, men eg spái, at Eivör fer at raka ein nógv breiðari skara enn hon er von, og av tí sama fer at náa nýggjar hæddir í tónleikaheiminum.







